Jóladøgverðatilboð frá Føroya Keypssamtøku um alt landið

Íslendskar rullupylsur

Fyri kilo 49[95]

Nakkasteikir – kjøtugar uml. 2,8 kg

Fyri hvørja 129[95]

Íslendsk lambskrov – nýflett

Fyri kilo 49[95]

Íslendskir lambsbøgir – strektir, 1,2-1,4 kg

Fyri hvønn 69[95]

Turrur fiskur – íslendskur

400 g fyri 159[95]

Lambstjógv – nýsælendsk uml. 1,8 kg

Fyri hvørt 119[95]

Cherry Valley dunnur 3200 g

Fyri hvørja 129[95]

Um alt landið! fk



SAMRÁÐINGAR

*Samráðingarnar byrja væntandi í morgin ella mikudagin og so fæst at vita, hvør dregur logra stráið, fakfeløgini, sum hava kravt lønarhækking ella Fíggjarmálaráðið, sum hevur kravt eina null-loysn*

# Verkfall í fyrsta lagi sunnukvøldið

Áki Bertholdsen

Tað er nú greitt, at fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum kunnu í fyrsta lagi fara í verkfall á midnátt sunnukvøldið.

Tað staðfestir Terje Sigurðsson, semingsmaður.

Hesar seinastu dagarnar hava hann og hin semingsmaðurin, Hákun Steingrímsson, havt fund við báðar partarnar í trætuni, sum eru Fíggjarmálaráðið øðrumegin og tey fimm fakfeløgini hinumegin.

Tey fimm fakfeløgini eru Starvsmannafelagið, Pedagogfelagið, Lærarafelagið, felagið fyri sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag, sum øll samráðast saman.

Tey hava treytaleyst kravt lønarhækking, men Fíggjarmálaráðið hevur líka avgjørt víst kravinum aftur.

Á fundunum við partarnar hava semingsmenninir fingið kunning um samráðingarnar higartil og um tey krøv, sum hvør partur hevur.

Samstundis er ein mannagongd avtalað fyri semingsroyndina.

Og Terje Sigurðsson sigur, at sjálv semingsroyndin byrjar týsdagin ella mikudagin.

Men hann staðfestir eisini, at eitt møguligt verkfall ella verkbann er í øllum førum útsett til sunnukvøldið.

Men eru samráðingarnar ikki lidnar tá, verður ein møguligur arbeiðssteðgur eisini útsettur.

Hann staðfestir, at ongar samráðingar líkjast og fortreytirnar eru ymiskar og hann dugir ikki at síggja, at hesar verða torførari enn aðrar, hann hevur roynt seming í.

– Og tó, tað er sjáldsamt, at báðir partar hava almannakunngjørt treytaleys krøv frammanundan eini semingsroynd, leggur hann afturat.

Men hann dugir kortini ikki at siga um hetta skal tulkast sum um at hendan samráðingarroyndin verður torførari enn aðrar.

aki@sosialurin.fo